

Hesi trý eru eitt ára gomul. F.v. Richard og so Geir og Vár



Lars og Emil eru trý ára gamlir. Teir hava funnið sær okkurt at spæla við, og teir sita í øllum rokinum á køksgólvinum

Framhald av síðu 9

verður vita vit ikki, siga tær.

Og nú er stríðið komið til at taka eina felagsmynd. Og at fáa 16 børn at sita í frið er ikki bara sum at siga tað. Onkur fær okkurt stungið í hondina, og so er friður. Men so er tað onkur heilt annar, sum als ikki klárar at sita í frið til fotografurin hevur tikið bíløt. Alt møguligt verður roynt, men har hjálpir ongin góða mamma. Loksins eru øll so nøkunlunda sitandi, og nú er ikki nógv annað enn at klikka, og so eru myndirnar endiliga komnar til høldar. Nú er skjótt døgurðatíð og tey yngstu byrja so smátt at troyttast, og mammurnar byrja at tosa um at sleppa sær heim aftur. Vit takka fyri okkum og fara útaftur í kalda vetrarvindin á Signabø. Í dag hava vit sæð 16 tvíburar í senn. Meira enn tey flestu kunnu reypa av.



Tey eru bæði tvíburar, men ikki systkin. Vár er eitt ára gomul, meðan Heðin er trý

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Jógvan Hugo Gardar, Oslo, hugoga@online.no – jogvan.gardar@c2i.net
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Sannleikin um samleikan

Hvørjir eru vit, og hvat vita onnur um okkum, vit sum kalla okkum føroyingar. Vit hava fyri vana at kalla grannarnar fyri eystan, vestan og sunnan fyri brøðratjóðir. Vanliga vita brøður nógv um hvønn annan - í øllum førum tað mest neyðuga. Men so er ikki, tá vit tosa um brøðratjóðir. Ein og hvør, sum hevur búleikast í Danmark í styttri ella longri tíð veit, at tey vita sera lítið um veruleikarnar í øllum pørtum av kongaríkinum. Her í Noregi er støðan als ikki betri. Norðmenn sigast at vita nógv um føroyingar, og teir brúka eitthvørt høvi til at siga okkum føroyingum at vit eru teirra nærmastu frændir og vinir. Hvat sum er orsøkin til hesa vinsælu er ikki gott at siga - tí hetta ynski um at hava ein felags samleika byggir sjáldan á kunnleika og sannleika. Tað sær ein bæði tá ein tosar við norðmenn og tá ein lesur tað, teir skriva um brøðratjóðina.

Ein norðmaður, sum er so glaður fyri ferð sína til Føroyar, bjóðar seg fram á alnótini til at halda fyrilestrar og vísa myndir av hesum spennandi oyggjalandi. Hann vil gjarna fortelja um t.d. "Risin og kenningin". Í limablaðnum hjá Norrøna felagnum, Norden Nytt, ið eisini verður sent limunum í føroyska Norrøna felagnum kundu vit í heyst lesa um eina ferð hjá einum bólki úr Tróndheimi, m.a. í vinarbýnum Klaksvík. Meginparturin var á góðari leið, men tá tey komu til høvuðsstaðin so mistu tey staðkensluna. Í øllum førum høvdu tey eina mynd, sum sýndu nøkur av teim ferðandi á bonkinum niðri í

Vágsbotni, ella Undirhúsið sum tað eisini kallast. Í myndatekstinum stendur at myndin er tikin niðanfyri "Tingvellir".

At vanlig ferðandi ikki altíð fáa alt við sær hvar tey eru og hvat alt eitur, er kanska ikki so løgið. Men ein skuldi trúð, at tey sum arbeiða neyvari saman við føroyingum og siga seg hava umfatandi kunnleika um hetta oyggjalandið, vóru meir neyv, tá tey sendu fólk av stað.

Islandia Travel, ið sendir fólk til Føroyar og Ísland skuldi verið ein fyritøka, har vitanin um Føroyar var á góðari leið. Men tá ein lesur á heimasíðu teirra, so fær ein mistanka um, at hetta er eitt annað land teir skriva um:

"Dugvugardur, det gamle gårdshuset på Saskun"

"Om ettermiddagen anbefaler vi en tur til de nordligeste øyene for å besøke Klasvik og Vidareidi. Velg mellom innkvartering på Hotel Nord i Vidareidi eller Klasvik gjestehus."

"Vi anbefaler en seiltur med en av postbåtene, fra Klasvik til Husar og Sydradalur på Kalsoy og en tur til Trøllnes"

Í gerandisdegnum upplivir ein eisini at fáa søgur sum ein skuldi trúð ikki eru sannar. Kannaði nýliga um ein føroyskur tónleikabólkur kundi sleppa at spæla á einum jazzklubba her í Oslo. Svarið var nei. Tá eg so spurdi um orsøkina, var svarið, at bólkurin saktans kundi spælt hjá teimum - tí góðskan var sera góð. Men hví kundu tey so ikki bjóða føroysku tónleikarunum at spæla, jú tí tað var so dýrt. Eingin hevði tosað um nakran prís. Tey vóru vís í, at Føroyar var so langt burturi, at tað vildi kostað ov nógv at fáa bólkin hendanvegin. At hesin jazzklubburin so í staðin fann sær ein bólk úr Tromsø at spæla hetta kvøldið var líkamikið. Tað er hóast alt í Noregi - sjálvt um tað kostar umleið tað sama at flúgva úr Tromsø til Oslo sum úr Føroyum til Oslo. Men tann besta er álíkavæl um spurningin sum konan fekk nakað herfyri. Hon sat og tosaði við ein dámu sum tyktist at vera hampuliga vælvitandi um tað mesta. Tá hon so hoyrdi, at eg var úr Føroyum segði hon, at tað var eitt spennandi land. Men so kom ivin og dáman spurdi um, hvussu leingi hesin føroyingurin hevði verið í Noregi. Konan svaraði, at hann hevur verið her í skjótt tólv ár. Nú skilti dáman einki, og mátti spyrja:

- Hvussu hevur hann fingið uppihalds- og arbeiðsloyvi í Noregi í so nógv ár? Tá hugsaði eg, ja hvat skuldu vit gjørt uttan bróðurandan í tí norðurlendska samstarvinum. Har øll eru vinir, øll kunnu vitja hvønn annan og øll kunnu arbeiða hjá hvør øðrum. Bara synd at so fá vita um tað!




# Brúkt, men góð arbeiðsamboð

**Til sølu í løtuni:**

**Volvo A20 6x6 dumpari**, seriu nr. A20V2445 – 20,5x25 dæk 10%, 16000 arb. tímar, £ 15500,00

**CAT 938G Wheel Loader** seriu nr. 6Ws00931, 1998, 11500 arb. tímar – 17,5x25 dæk 30% góð £ 39500,00

**CAT 963 Track Type Loader** seriu nr. 21z3868 – 1990 – 16500 arb. tímar – Beltir 50% góð fleirnýtslu skovl – oljuskiftir fylgd frá nýggjum, £ 21500,00

**JBC 3 Cx Sitemaster** (ikki turbo) 1995 – dæk miðal 50% – 2500 tímar ? (ur virkar) £ 13000,00

**Bíligur Ford A62 Wheel Loader.** Koyrir ok, men ongar bremsur, lift armur lekur, osfrv., £ 3500,00

Somuleiðis mongd av smáum kompressarum og Benford blandimaskinum.

Prísir við fyrispurning.

**Ian Dickie (Plant Sales) Ltd.**
23 Wyvis Drive
Nairn IV12 4TP
Scotland
Tlf. 0044 1667 456001
Fax 0044 1667 451144


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3080, P/F O. C. Holding, 450 Oyri.

**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Ólav Sune Marius Fløtt, 470 Eiði.
Innkomin sum formaður: Hans Oliver Joensen, 450 Oyri.
**Farin úr nevndini:** Edmund Esbern Johannes Joensen, 450 Oyri.
**Innkomin í nevndina:** Edfríð Joensen, 450 Oyri.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Edmund Esbern Johannes Joensen, 450 Oyri.
**Innkomin sum stjóri**: Ólav Sune Marius Fløtt, 470 Eiði.

*Skráseting Føroya tann 28. november 2002.*
*Kristin Balle*


www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin í Øksnagerði**

Í dagstovninum ganga 60 barnagarðsbørn

Stovnurin er skipaður við einari smábarnastovu, og tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari serstovu við10 børnum. Á stovninum starvst 19 starvsfólk.

Vit eru ein nýggjur stovnur, ið lat upp í september 2001. Stovurnar eru góðar og rúmligar. Vit hava útbúgvið fólk á øllum stovum.

www.torshavn.fo

## Pedagogar til Dagstovnin í Øksnagerði

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogum 40 tímar um vikuna í smábarnastovu við 3 ára gomlum børnum og barnagarðsstovu við 4-7 ára gomlum børnum. Starvið verður sett 1. februar 2003.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Setanarsamrøður verða 19.-20. desember

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jesper Roos, leiðara, tlf. 31 99 59 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 2, FO-100 Tórshavn, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mikudagin 18. desember 2002.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Frá Kommunalu brennistøðini á Sandvíkarhjalla. Blaú posarnir til vandamikið burturkast verða bornir út í komandi viku.

Posarnir verða heintaðir aftur vikuna eftir. Vegleiðing um vandamikið burturkast er á posanum.

**Kommunala brennistøðin á Sandvíkarhjalla**

SNARSKIVAN

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Sosialurin - 311820

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

# Gott jólabingo

- Verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin kl 16
- 6. og 12. spæl full pláta - heilt krov
- 12 plátur 100 kr.
- 15 vinningar á lutaseðli
- Høvuðsvinningur - balja full av mati og heilt krov
- Drigi verður millum spølini
- Ókeypis kaffi og rís a la mande í steðginum

Glæman



# GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

# Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

# Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

**Bæði til vinnuligt og privat**



pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

# Arbeiðshandskar

til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

Sosialurin 311820

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

# FØROYA STØRSTA ÚRVAL AV SMÁUM UPPVASKIMASKINUM



PRÍSIR ÚR EINANS 2490,00

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697